# Alex Buvik seksti



Í dag verður Eugen Alexander Sorgei Buvik 60 ár, ella bara kendur sum Alex Buvik.

Alex er norðmaður, hálvur russari, men hevur tey seinastu árini búð í Havn, har hann starvast sum trygdarstjóri í Oljumáláráðnum.

Alex er útbúgvin verkfrøðingur. Heilt frá ungum árum, tá norska oljuævintýrið enn var í síni byrjan, hevur hann starvast innan hetta yrki. Eftir nøkur ár í Oljudirektoratinum í Stavanger arbeiddi hann nógv ár í privatu oljuvinnuni, har hann eitt langt skeið var stjóri á stóra norska oljupallinum, Valhall.

Tá landsstýrið fór undir fyrireikingarnar til veruligar oljuleitingar í Føroyum, varð Alex í 1995 settur i starv á Oljufyrisitingini, ið tá var, við ábyrgd av øllum trygdarviðurskiftum. Og sigast má, at hann hevur verið ein sannur fongur hjá føroysku oljuumsitingini. Ikki einans í sjálvum arbeiðinum hevur hann bygt varðar og sett síni greiðu spor. Hann hevur við hepnari hond eisini verið ein høvuðskraft aftan fyri arbeiðið at fáa oljufeløgini at taka trygdar- og umhvørvisspurningar við frá fyrsta degi í teirra fyrireikingum at leita eftir olju á okkara leiðum. Í tí heimliga oljuvinnuumhvørvinum hevur hann somuleiðis verið við til eitt nú stovnsetingina av Oljutinginum, eins og hann hevur verið við í nógvum øðrum mennandi tiltøkum.

Alex hevur eisini verið ein týðandi katalysatorur í sambandi við samskipan av eini føroyskari tilbúgving. Og nógv annað kundi verið nevnt um henda sjarmerandi og hugnaliga norska víkingan. Tað er ein sannroynd, at norðmenn hava dugað væl at bygt upp og ment eina oljuvinnu uppá teirra egnu treytir. Hjá okkum føroyingum - at fáa ein slíkan norðmann higar at leggja okkum lag á og tryggja, at vit bera okkum eins skilagott at sum norðmenn og at vit haraftrat royna at sleppa undan at gera teirra mistøk - er tað einki minni enn eitt "fund", fyri at brúka eina rámandi mynd úr oljumálinum.

Í umleið sjey ár hevur hesin fryntligi og altíð blíði tó eitt sindur harðmælti norðmaðurin verið ein partur av býarmyndini í høvuðsstaðnum. Hann sæst og hann hoyrist, har hann er og fer. Og í kjalarvørrinum á honum liggur eisini altíð okkurt gott eftir, vitan og royndir, sum í síðsta enda skulu gagna øllum føroyingum, nú vit vóna og halda, at vit stevna móti at gerast ein oljuframleiðandi tjóð. Hjartaliga tillukku Alex. Við vón eina góða framtíð fyri teg og tína familju og nógv ár aftrat her á klettunum úti í Norðuratlantshavi. Gævið tær verður unt at vera her, tá fyrsti oljudropin kemur upp úr undirgrundini.

*Vinir*

# Ólavur í Beiti fimmti



Í dag, 23. november, verður Ólavur í Beiti, rithøvundur úr Sørvági, fimmti ár.

Ólavur vaks upp hjá Hans og Lenu í Beiti í Sørvági. Hann tók studentsprógv í Hoydølum í 1973. Síðani hevur hann fingist við ymiskt. Hann starvaðist í yngru árum sum blaðmaður í nøkur ár, var við fiskiskipum á lodnuveiðu og á makrelveiðu. Eisini hevur hann verið í langfarasigling.

Í nøkur ár var Ólavur lærаравikarur, og í 1976/77 var hann vikarur í Mykinesi.

Ólavur hevur búð í Onglandi og í Danmark í nøkur ár, har hann hevur lisið, men nú býr hann í Hjørring í Norðurjútlandi saman við dóttrini, Katrin.

Hann hevur eisini verið parttíðar blaðmaður hjá Sosialinum – hetta var, tá Sosialurin fyri nøkrum árum síðani byrjaði við redaktiónunum kring landið. Tá var Ólavur í Beiti »okkara maður« í Vágum.

Bókmentalistin hjá Ólavi er langur:
Ung Sál 1980
Genturnar í Leixöes 1988
Sørvágs skúli 1989
Einaferð 1989
Frøkun snarljós og hennara dýrabæra ogn 1994
Eitt slag av tíð 1995
Tá ið tú kemur 1996
(Eisini týdd til danskt)
Úr egnum barmi 1997
Losi tann fyrsti 1997
Til kærleikin meg skilir 1998
Sangur einliga pápans

Fleiri av søgunum hjá Ólavi hava verið lisnar upp í Útvarpi Føroya og hava eisini staðið í føroysku bløðum.

Í 1990 varð Ólavur biðin um at senda søgu til stuttsøgukapping, sum Gula Tidend í Noreg skipaði fyri, og sama ár var hann eisini eitt skifti á Skrivekunstakademiet í Bø í Telemørkini í Noreg.

Ólavur gongur í løtuni á listaskúla í Hjørring.

Vit ynskja Ólavi hjartaliga tillukku við degnum!

## Stór jólaøl frá Føroya Bjór




**Í gjár kom stóra jólabryggin frá Føroya Bjór á marknaðin**

NÝGGJ ØL
*Tíðindaskriv*

Hettar er hin stóra 1,25 liturs plastfløskan, sum longu er roynd og sera væl umtókt í øðrum londum, sigur Føroya Bjór, sum leggur afturat, at serliga fløskan er ment tilvitað til øl.

Fløskan er so mikið stór, at ikki er ráðiligt at koyra bil, hóast tú bert hevur drukkið eina.



# Tað gongur betur við klaveri í stovuni



*Sambært kanningum er tónleikur mennandi fyri børn, bæði fakliga og sosialt. Tá Durita sum lítil smágenta vildi læra at spæla klaver, var bíðlistin langur. Her er hon avmyndað saman við klaverlærara sínum, sum kom heim at undirvísa henni*

*Mynd: Jan Müller*

**Tað eru lærararnir, ið fáa skoluna, hvørja ferð ein OECD- kanning vísir, at donsk børn duga verri at lesa og rokna enn aðrir ungir verðinsborgarar. Men tá ið granskarar fara í dýpdina við tølunum, er ein onnur frágreiðing, sum heilt týðiliga slær ígjøgnum: Tað snýr seg um bakstøði hjá foreldrunum, sigur Anne Bech-Danielsen í eini grein í Politikken herfyri**

SKÚLI OG SAMFELAG
*Rúna Sivertsen*

Seinast í oktobur var altjóða ráðstevna á Fjóni undir heitinum; Skole & Samfund. Har lýstu granskarar í Danmark og úr øðrum londum, hvat skúlarnir vildu fáa burturúr við at nýta foreldrini konstruktivt í menningini av børnunum.

Kanningar vísa, at børn, hvørs foreldur hava lítla skúlagongd, klára seg verri enn børn úr heimum, har bøkur eru á hillunum og klaver í stovuni.

Ráðstevnan tók støði í PISA-kanningini, har 172.000 børn úr OECD-londunum vórðu nároynd í lesing, rokning og náttúru.

Niels Egelund, professari, Danmarks Pædagogiske Universitet, hevur nærlisið risastóru dungarnar av dáta.

Tað vísir seg, at donsk børn - hóast verðins dýrastu útbúgvingarskipan - ikki duga so mikið væl at lesa, at tað eydnast teimum at náa um miðaltølini.

### Klassisk mentan er best

Hvussu væl børnini klára seg bókliga, er ikki bara treytað av atgongd til teldu og alfrøði heima. Tann klassiska mentanin børnini, uppliva heima, hevur størri týdning enn útbúgvingarstøðið hjá foreldrunum.

Tey foreldur, sum seta pening í eitt klaver, gera sambært kanningini, íløgu í eina góða barlast til børn síni.

Børn, sum sleppa við foreldrunum á konsertir og listaframsýningar ella tosa politikk heima, klára seg vanliga væl - ikki bara í tónleiki, list og samfelagslæru, men eisini í skúlans torføru lærugreinum.

Formaðurin fyri Skole og Samfund, Thomas Damkjær Pedersen, fatar ikki, at útbúgvingarskipanin ikki í størri mun tekur hædd fyri, at foreldrini hava ein so stóran leiklut í útbúgvingini av børnunum.

- Í mun til, hvussu nógv vit annars hugsa um kostnaðin av danska skúlaverkinum, er tað ótrúligt, hvussu lítið vit gera burtur úr samastarvi millum heim og skúla, sigur hann.

Í samstarvinum millum heim og skúla, liggur ein stór orka. Flestu foreldur vilja fegin hjálpa, verður at enda sagt í greinini hjá Politikken.

# Hugnaløta fyri blóðgevarar í Klaksvík

**Hóskvøldið í komandi viku, verður árliga hugnaløtan fyri blóðgevarum í kantinuni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi**

BLÓÐDONORAR
*Rúna Sivertsen*

Hóskvøldið 28. novembur kl. 19, verður hugnaløta í kantinuni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi fyri Klaksvíkar blóðdonorliði.

Hvørt ár undan jólum, bjóðar sjúkrahúsið blóðgevarum sínum til eina slíka hugnaløtu við ábiti.



*Jonhard Larsen er ein av teimum um 250 blóðgevarunum hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi. - Tað er ein góð kensla at geva blóð, sigur Jonhard, sum eggjar øðrum ungum at gerast blóðgevarar.*

*(Mynd Rúna Sivertsen)*

Skipað verður fyri undirhaldi, og eisini fer Korosh at halda fyrilestur um blóðtrýst.

Korosh Taheri er ættaður úr Iran, men tað eru mong ár, síðani hann flutti úr heimlandinum. Korosh, sum er medisinskur yvirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, verður bara róptur við fornavni sínum.

### Lívsneyðug gáva

- Tað er gott, at tað finnast fólk, ið vilja geva blóð. Tað er veruliga ein gáva, tey geva, tí í mongum førum eru blóðgevarar við til at bjarga lívum, sigur Karin Jacobsen, bioanalytikari.

Karin sigur eisini, at tað er neyðugt, at tað allatíðina er ein tilgongd av blóðgevarum, tí tað sjálvsagt er ein náttúrlig frágongd.

Klaksvíkar blóðdonorlið varð stovnað av Petur Waagstein, 3. desembur 1957. Fyrstu, ið sótu í nevndini, vóru; Sigurð Heinesen, lærari, Olaf Bjartalíð, portørur og Petur Waagstein, yvirlækni.

Tey, ið løgdu lunnar undir Klaksvíkar donorlið, vóru Klaksvíkar Ítróttarfelag og skótarnir.